## 1. deild leygardagin 31. mars

| | |
|---|---|
| B68-FSV04: | Regin Egholm |
| ÍF-HB: | Dan Højgaard |
| LÍF-TB: | Eiler Rasmussen |
| NSÍ-B36: | Andrew Christiansen |
| SÍ-KÍ: | Jan Skoradal |

## Formula deildin sunnudagin 1. apríl

| | |
|---|---|
| B36-KÍ: | Petur Reinert |
| GÍ-EB/Streymur: | Páll Augustinussen |
| SKÁLA-HB: | Dagfinn Olsen |
| B71-NSÍ: | Ransin N. Djurhuus |
| VB/Sumba-AB: | Rúni Gaardbo |

## Kvinnudeildin sunnudagin 1. apríl

| | |
|---|---|
| KÍ-GÍ: | Ove Heinesen |
| NSÍ-EB/Streymur: | Hagbard Joensen |

# Popczynski er nógv órógvaður



*Føroyameistararnir úr HB vitja á Skála í fyrsta umfari av Formula-deildini. Skála hevur havt gott tak á HB á heimavølli, síðani teir komu upp í bestu deildina.*

**Fyrireikingarnar undan torføru avbjóðingini á Skála seint seinnapartin sunnudagin hava ikki verið optimalar hjá meistarunum í HB**

**SKÁLA-HB**
*Jákup Mørk*

Meistararnir fara beinleiðis í eldin. Í fyrsta umfari í Formula kappingini skulu teir spæla á Skála, har HB hevur havt tað torført, síðani Skála gjørdist partur av bestu deildini. Á bygd verður virksemi og umstøður lagað hvørt eftir øðrum. Fyrsta bríkslið undir Mýruhjalla verður ikki fyrrenn klokkan 17. Tað kemst av, at tað verður konfirmatión á Skála sunnudagin.

Tað er synd at siga, at fyritreytirnar hjá HB hava verið optimalar undan fyrsta umfarinum í nýggju kappingini. Krzystof Popczynski hevur ikki havt møguleikar at venja saman við øllum teimum ellivu, sum hann ætlar skulu vera á vøllinum frá fyrsta bríksli, síðani týskvøldið í síðstu viku.

Orsøkin til hetta er einføld. At HB eigur nógvar góðar spælarar og tískil av teimum flestu verður roknað at verða favorittur at endurvinna FM sæst aftur í, at felagið eigur fleiri spælarar á landsliðnum enn nakað annað felag. Í ferðalagnum, sum hevur verið í Georgia, og sum ikki lendi aftur í Vágum fyrrenn seint í gjárkvøldið, vóru fimm HB spælarar: Mortan úr Hørg, Rasmus Nolsøe, Christian Høgni Jacobsen, Jákup á Borg og Rógvi Jacobsen. Hjá hesum ræður um at fáa ferðamøðina úr kroppinum og sinninum, áðrenn tað eftir døgurða sunnudagin verður farið inn á Skála.

Hóast fleiri lyklaspælarar frá í fjør eru burtur, og venjarin er nýggjur, so kenna teir á Skála seg væl trimmaðar til fyrstu avbjóðingina í nýggju landskappingini. Í fjør var liðið nógv skaðaplágað. Liðformaðurin á miðvallarálitið hevur verið so mikið skaðaplágaður, at hann var noyddur at geva avboð til landsliðið.

Nú er Pauli komin so frægt fyri seg, at hann hevur vant saman við hinum, og hann verður førur fyri at spæla sunnudagin, og tað eru allir hinir eisini. Eingin av Skála spælarunum hevur verið eystanfyri í landsliðsørindum, og nú hondbóltsárið er av hjá StÍF savna ítróttarspentu íbúgvararnir á vestara armi av Skálafjørðinum seg fult og heilt um besta liðið hjá Skála.

Um tað skal hilnast betri hjá Skála undan summarsteðginum í ár, enn tað gjørdi í fjør, tá ið úrtøkan var sera soltin, fæst fyrsta ábendingin um nú sunnudagin.

Í 2. umfari í steypakappingini eydnaðist tað bæði Skála og HB at kvalifisera seg til víðari luttøku. Skála vann tepurt á heimavølli ímóti FS Vágar04, og HB vísti seg frá góðu steypasíðuni, sum liðið er kent fyri. Í tættari uppgerð undir torførum umstøðum eydnaðist tað eftir longda leiktíð at vinna 2-1 í Runavík. Ta ferðina var Rógvi Jacobsen sera sentralur. Aftur mikukvøldið vísti hann máltev í Tblisi. Ein av stóru spurningunum hjá skálamonnum er, hvussu teir skulu ansa eftir manninum við máltevinum.

# Teir 50 ára gomlu eiga torføra avbjóðing

**Á útivølli ímóti øðrum av nýggju luttakarunum í bestu deildini rokna favorittarnir í NSÍ við at torfør avbjóðing bíðar á Sandi**

**B71-NSÍ**
*Jákup Mørk*

Síðsta leygardag fór NSÍ um tey hálvt hundrað. Fyrsti møguleikin, sum besta liðið hjá teimum fær at geva felagnum bestu føðingardagsgávuna, sum allir NSÍ fjepparar kundu ynskt sær, verður sunnudagin, tá ið B71 verður vertur á Sandi.

Á pappírinum tykist avbjóðingin hjá NSÍ neyvan millum tær torførastu. Meðan NSÍ við Johan Nielsen við róðri og fleiri nýggjum profilum á liðnum verður roknað sum upplagt evni millum fimm tey fremstu, so verður B71 mett at fáa trupulleikar at standa seg millum tey bestu.

Tað eru tó ikki prát og metingar, sum fara at gera av, hvussu støðutalvan fer at síggja út miðskeiðis í oktober. Tað verður spælið og stríðið á vallunum kring landið, sum fer at gera hetta av, og sandoyingar eru rættuliga spentir at fara undir stóru avbjóðingina, sum teir ikki hava roynt síðani í 2001.

Aðalroyndin var í steypadystinum í Streymnesi, har EB/Streymur vann 4-1. Sandoyingar vóru ikki nøgdir við spæl og hugburð. Nú vóna teir, at vánalig undanroynd fer at bera góða fyrstu roynd við sær.

Hjá B71 er Wellington Soares leikbannaður, eftir at hann í síðstu sekundunum í steypadystinum varð vístur av vøllinum.

Á NSÍ er nógv nýtt fólk bæði á vøllinum og á beinkinum. Tað er lítið sannlíkt, at Bogi Løkin verður førur fyri at spæla. Hann hevur verið darvaður av skaða, og hóast hann hevur vant í hesi vikuni, so hevur tað ikki verið við fullari ferð. Tá ið vit frættu, var tað ikki greitt, hvør fer at loysa av á sentrala miðvøllinum, men veteranurin Sjúrður Jacobsen varð nevndur at verða ein møguleiki.

Verjuálitið Pól Thorsteinsson er burturstaddur og verður tískil ikki við. Debus Danielsen og Øssur Dalbúð hava verið skaðaplágaðir, men teir hava báðir vant saman við hinum í hesi vikuni, og teir verða í ferðalagnum um Skopunarfjørð.